Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Annika Olsen, løgtingsmaður

Svarari: Jenis av Rana, landsstýrismaður í uttanríkis- og mentamálum

Evni: Tjóðleikhúsið

Spurningar:

1. Nær kann væntast, at spakin verður settur í at byggja tjóðleikhúsið ?
2. Metir landsstýrismaðurin, at játtanin á fíggjarlógini til tjóðleikhúsið er nøktandi?
3. Hvussu nógvur peningur skal setast á íløgujáttanina komandi árini fyri, at tjóðleikhúsið verður veruleiki, og ætlar landsstýrismaðurin at raðfesta tjóðleikhúsið á komandi fíggjarlóg?

Viðmerkingar:
Nú er endalig avgerð tikin um, at tjóðleikhúsið skal byggjast í Havn, og herfyri samtykti Tórshavnar býráð somuleiðis, at tjóðleikhúsið skal byggjast við Eystaru vág. At byggja tjóðleikhúsið er ein landsuppgáva, og á fíggjarlógini eru játtaðar 5 mió. kr. í 2022, meðan tað fyri ætlanarárini eru settar av 7 mió. kr. í 2023 og 10 mió. kr. í 2024. Tað er ein sannroynd, at hesar upphæddir neyvan røkka til at byggja tjóðleikhúsið, og tí er áhugavert at vita, nær veruliga byggingin fer í gong, og hvussu nógvur peningur er neyðugur at seta á fíggjarlógina komandi árini. Tí verða hesir spurningar settir.

Á Løgtingi, 22. apríl 2022

Annika Olsen